## Valur vann stórt

Eingin stegðar Vali í bestu íslendsku kvinnudeildini í løtuni. Liðið hevur eftir 12 umførum fult stigatal, og hevur beina kós ímóti meistaraheitinum.
Í málinum stendur føroyska Randi Wardum, og í gjár vunnu hon og liðfelagarnir heili 5-0 á heimavølli móti Fjölnir, sum er botnproppur í deildini. Margrét Lára Viðarsdóttir gjørdi bart og stóð fyri øllum málunum. Valur hevur í løtuni 36 stig, sum er seks fleiri enn KR, sum liggur á øðrum plássi.

## Ingi Højstted verður við

- Ingi Højsted hevur vant við fullari ferð seinastu vikurnar, og hann er væl fyri. Hann verður á beinkinum í kvøld, og verður væntandi innskiftur í seinna hálvleiki. Heðin Askham staðfestir fyri Rás2 fyrrapartin, at Ingi Højsted fer at luttaka, tá B36 og Brøndby bresta saman í Gundadali í kvøld. Miðvallarin hevur ikki verið á vøllinum, síðan hann í fjórðingsfinaluni í kappingini um løgmanssteypið ímóti 07 Vestur varð útskiftur, orsaka av skaða. Venjarin hjá árstalsfelagnum sigur eisini, at Súni Olsen eftir øllum at døma ikki verður á vøllinum komandi tvær vikurnar.

B36 - Brøndby:

# Meira ansnir í deyðbóltstøðum

**Klæmint Matras, liðformaður hjá B36, sigur, at hann og liðfelagarnir mugu verða meira ansnir í deyðbóltstøðum. – Teir eru sterkir í slíkum støðum, sigur miðvallarin**



UPPTAKT
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

- Viðmerkjararnir til dystin hjá okkum á Brøndby Stadion søgdu millum annað, at vit vóru gumpatungir. Tílíkt skulu vit ikki hava liggjandi á okkum.

Klæmint Matras, liðformaður hjá B36, hevur áður verið við til stórar altjóðar dystir við árstalsfelagnum. FC Midtjylland og Fenerbache hava millum annað vitjað í Føroyum, og í kvøld skulu hann og liðfelagarnir royna seg móti Brøndby.

- Vit vóru ikki nóg ansnir, tá Max von Schlebrügge stýrdi bóltinum í netið. Tað má ikki koma fyri í dag. Teir hava fleiri væl vaksnar leikarar, sum eru sterkir í slíkum støðum, sigur hann.

Stríðsmaðurin á miðvøllinum vísir á, at Brøndby hevur nógv sjálvsálit í løtuni, og tað krevur stóran vilja, um B36 skal vinna seg víðari.

- Teir hava glæsiligu søgu, og hava fleiri ferðir áður spælt tílíkar dystir. Eg meti tó, at vit vinna dystin 1-0, sigur Klæmint Matras við Rás2.

### Avgera tíðliga

- Um vit vísa sama máltev sum undir venjing í gjár, so skuldi ikki verði nakar ivi, sigur David Williams, framherji hjá Brøndby

- Í kvøld ræður bara um at sleppa víðari og einki meira. Teir fara at stríðast alt teir eru mentir framman fyri heimaáskoðarunum, men tað eru vit fyrireikaðir uppá.

David Williams verður møguliga annar av framherjunum, sum verða millum teir fyrstu ellivu hjá Brøndby í kvøld. Hann staðfestir fyri almennu heimasíðuni hjá Brøndby, at hann og liðfelagarjnir ikki síggja graslíkið sum nakran vansa.

- Vit fara at spæla okkara spæl, og eg trúgvi ikki, at graslíkið fer at seta bein fyri tí. Vøllurin er fínur. Um vit vísa sama máltev sum undir venjing í gjár, so skuldi ikki verði nakar ivi. Hinvegin skulu vit ikki fáa mál ígjøgnum fyri at geva teimum eina vón. Vit gleða okkum til í kvøld, og líkamikið hvat skulu vit avgerða dystin tíðliga, sigur framherjin.

20 ára gamli David Williams hevur leingi verið at eiga eina sera bjarta fótbóltsframtíð, har hann av landsliðsvenjaranum hjá Avstralia, hiðani hann er ættaður, hevur verið skýrdur at verða størsta talentið síðan Mark Viduka.

### Vit eru klárir!

Heðin Askham, venjari hjá B36, staðfestir, at hansara leikarar eru til reiðar til stóru uppgávuna í kvøld. – Vit hugsa fyrst og fremst um verjupartin, og vónandi taka av einum møguleika, sigur hann

Heðin Askham hevur higartil flott úrslit at vísa á sum høvuðsvenjari í føroyskum fótbólti. Hann tók við venjarastarvinum hjá B36 í vetur, og higartil hevur gingið væl. Í kvøld skal hann leiða árstalsfelagið í Gundadali til ein hin størsta dystin á árinum.

- Vit eru í øllum førum klárir, og vónandi verða vit ótespuligir móti teimum. Vit hugsa fyrst og fremst um verjupartin, og so mugu vit taka av onkrum av møguleikunum, sum altíð koma. Vit skulu jú hava mál. Eyðkenni fyri Brøndby er, at teir leggja nógv fyri í bæði fyrra og seinna hálvleiki, og tá mugu vit verða til reiðar, sigur Heðin Askham, venjari hjá B36, við Rás2.

Torir tú at gita um úrslitið?

- Latið okkum siga, at vit vinna við einum ella tveimum málum, slær venjarin hjá høvuðsfelagnum fast.

### Fjas við prátinum um graslíkið

Tom Køhlert, venjari, vil ikki hoyra talan um prátið um graslíkið. – Harragud, svenska Elfsborg spælur eisini á graslíkið á heimavølli uttan trupulleikar, sigur Køhlert við heimasíðuna hjá Brøndby

Undir leiðslu av Tom Køhlert hevur Brøndby lyft seg úr kreppuni, og í løtuni stríðist sigursvanda felagið móti at vinna seg aftur í danska oddan. Lítillátni venjarin er hinvegin bersøgin við heimasíðuna hjá Brøndby, har hann ikki vil hoyra talan um prátið um graslíkið.

- Tað skulu vit als ikki hugsa um. Harragud, svenska Elfsborg spælur á graslíkið á heimavølli, og á grasið á útivølli. Og tað er uttan trupulleikar. Fyrimunurin hjá teimum er sjálvt umhvørvið, júst sum vit høvdu tað til okkara heimadyst, sigur Tom Køhlert.

Hvussu metir tú møguleikarnar vera fyri víðari luttøku?

- Teir eru góðir. Vit skulu verða munandi meira umhugsnir í okkara spæli, og ikki geva teimum pláss til mótálop. Altjóða fótbóltur hevur stóran týdning fyri felagið, og hóast vit ynsktu eitt betri útgangsstøði, so eru góðir møguleikar fyri víðari luttøku, sigur Tom Køhlert, sum metir dystin verða tann týdningarmiklasta á árinum higartil.